

## Hatta er privat

Stendur tað til James, skulu vit ávara børnini um pedofilar longu í barnagarðsaldrinum.

- Tað er meðan børnini eru smá, at hesir fanarnir pilka við tey. Tí skulu tey vita, at tað er skeivt, og at tey skulu siga onkrum vaksnum frá, um tey uppliva sovorit, sigur hann.

James hevur sjálvur gjørt sær nakrar tankar um, hvussu vit kunnu upplýsa børnunum. Meðan hann teknar eitt pinnafólk á eitt pappír, forklárar hann:

- Sex og porno er allastaðni. Vit síggja tað á internetinum, á fartelefonini, í kjattum og bløðum, í sjónvarpi og so framvegis. Tí noyðast vit eisini at seta orð á, og at upplýsa børnini um, hvar markið gongur, sigur James, og teknar ein ring rundanum undirkroppin á pinnamanninum, meðan hann avgjørdur peikar inní við penninum:

- Vit kunnu tekna eitt fólk fyri barninum og stutt og greitt forklára, at her sum ringurin er, hevur ongin fremmandur loyvi til at nerta við teg, sigur hann.

## Tónleikurin er bjargingin

Spurdur, hvussu hendingin hevur ávirkað hann, svarar James, at saman við uppvøkstrinum í einum kærleiksleysum heimi, hevur hetta verið við til at rúgva nógvar aggressiónir upp innan í honum.

- Men eg havi dugað at fáa kenslurnar út á ein positivan hátt gjøgnum tónleikin. Onkuntíð havi eg undrast á, at eg ikki eri vorðin antin harðskapsmaður ella óttast at eg fór at vera pedofilur, tí man hoyrir ofta, at sovorðnar upplivingar ganga aftur, sigur James. Hann fór enntá so langt sum at søkja starv í einum barnagarði fyri at kanna, um hann á nakran hátt kundi funnið upp á at nortið eitt barn. Men tíbetur var hesin óttin ógrundaður.

- Tað virkar kanska sum um at eg altíð eri glaður og eydnuríkur, tí eg skemti nógv og royni at taka lætt upp á tingini. Men fólk skulu heldur ikki misskilja, at vit øll spæla ymiskar leiklutir í lívinum. Mín leiklutur "on the road" er at vera positivur og humoristiskur, sigur hann, og leggur afturat, at privat er hann ein róligur og rættiliga magiligur maður, sum hevur havt sínar upp- og niðurtúrar í lívinum.

-Uppvøksturin, harðskapurin og kynsliga misnýtslan hava gjørt, at eg til tíðir havi gingið við sjálvmorðstankum. Eg kundi eisini endað sum alkaholikari ella úti hjá Árna. Men eg eri altíð sloppin av við aggressiónirnar gjøgnum tónleikin, sum avgjørt hevur verið mín bjarging, sigur James, sum hevur lært seg at góðtaka lagnuna, sum hon lagaði seg hjá honum.

- Hetta er ein partur av mínum lívi – eitt súrt epli, sum eg einaferð beit í. Tað má eg bara góðtaka og brúka til nakað positivt, sigur James at enda.

*– Vit noyðast at koma hesum tabuinum til lívs. Pedofilar skulu ikki kenna seg tryggjar, bara tí teir kanska sjálvir hava verið misnýttir sum børn, ella tí vit bara eru eitt lítið forskrúvað samfelag, sigur James Olsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*